# KÍ vil hava Eyðun

Leiðslan í KÍ er eftir øllum at døma sera væl nøgd við arbeiðið, sum Eyðun Klakstein hevur gjørt, síðani hann tók yvir sum høvuðsvenjari hjá felagnum. Somikið væl nøgd, at honum nú stendur í boði at leingja sáttmálan. – Vit vilja fegnir hava venjaran at halda fram, og bæði hann og hjálparvenjarin umhugsa nú eitt útspæl frá felagnum, sigur Aksel Johannesen, formaður í Sp/f KÍ. Hann roknar við, at venjaraspurningurin verður avgreiddur innan fáar dagar.



# Samanlegging gongur eftir ætlan

Samráðingarnar um samanlegging av suðuroyarfeløgunum í fótbólti halda fram. Áður hava boðini verið, at málið er at fáa eina samanleggingarætlan fyri eykaaðalfundirnar hjá VB/Sumba og TB seinast í hesum mánaðinum, og tann ætlanin tykist halda. - Nevndirnar halda fram við sínum arbeiði í málinum. Og vit rokna framvegis við, at málið kann koma fyri ein eykaaðalfund um mánaðarskiftið, sigur Bjarni Johansen, formaður í VB/ Sumba

# Ole hevur sent FIFA eftir VB/Sumba

**Hóast tað er liðið eitt ár síðani, at Ole Andersen varð sagdur úr starvi sum venjari hjá VB/Sumba, so tykjast allir knútar viðvíkjandi uppsøgnini enn ikki vera loystir**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað hevur ljóðað, at danski venjarin hevur sent málið um uppsøgnina til FIFA, og hetta váttar Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF.
- Tað er rætt, at vit hava móttikið eitt skriv um málið frá FIFA. Vit hava biðið VB/Sumba um frágreiðing hesum viðvíkjandi, og ta frágreiðingina hava vit fingið og sent víðari, sigur Ísak Mikladal.
Bjarni Johansen, formaður í VB/Sumba, sigur, at hann ikki hevur nakrar viðmerkingar til málið yvirhøvur.
Sum skilst, so snýr málið seg um løn, sum Ole Andersen metir seg eiga til góðar hjá VB/Sumba fyri restina av sáttmálaskeiðinum.

# Fenerbache basti Inter

**Eingi heilt óvæntað úrslit vóru at síggja mikukvøldið í Champions League. Men við 1-0 tapi á útivølli fyri Fenerbache fekk italska Inter enn eina ferð eina truplan byrjan upp á bólkaspælið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ikki nakað vánaligt lið, sum B36 hitti, tá teir í fjør taptu greitt fyri turkiska Fenerbache í Champions League undankappingini.
At talan er um sterkt lið varð prógvað í gjár, tá italsku meistararnir úr Inter vitjaðu í Istanbul.
Úrslitið gjørdist ein 1-0 sigur til heimaliðið, sum við hesum fekk staðfest søguna um, at Inter ofta hevur tað trupult í Europa.
Aðrastaðni gjørdist talan ikki um tær heilt stóru sensatiónirnar. Barcelona. Roma og Arsenal vunnu øll tryggar heimasigrar, meðan Manchester United vann tepran 1-0 sigur á útivølli móti vinarfelagnum, Sporting Lissabon.

**Úrslitini mikukvøldið**

| | |
|---|---|
| Barcelona-Lyon | 3-0 |
| Rangers-VfB stuttgart | 2-1 |
| Roma-Dynamo Kiev | 2-1 |
| Sporting Lissabon-Man Utd. | 0-1 |
| Fenerbache-Inter Milan | 1-0 |
| PSV Eindhoven-CSKA Moskva | 2-1 |
| Arsenal-Sevilla | 3-0 |
| Slavia Prag-Steaua Bucharest | 2-1 |

# Gevandi Estlands-ferð

**Soleiðis sigur ein av gentunum á U17-kvinnulandsliðnum í fótbólti, sum mikukvøldið kom aftur til landið eftir at hava luttikið í EM-undankapping í Estlandi**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Tvey stórtap og ein sigur beyð fyrsta royndin uppá, sum føroyska U17-kvinnulandsliðið í fótbólti fekk í EM-undankapping í Estlandi í døgunum 11. – 16. septembur. Tó stendur hetta avrikið einki aftanfyri avrikini hjá øðrum liðum, sum í mun til okkum eru nógv størri fótbóltstjóðir.

Samd er 16 ára gamla Steintóra Joensen úr Vági, sum gjørdi bæði málini, ið liðið megnaði at gera á túrinum.

- Hetta er fyrsta árið Føroyar hevur U17-kvinnulandslið, so tað var spennandi at síggja, hvussu leikur fór at fara fram. Vit vistu ei heldur hvat vit kundu vænta av hinum liðunum. Vit vistu bert, at Belgia og Finnland høvdu havt U17-landslið í nøkur ár, so teimum kundu vit vænta at fáa mótstøðu frá. Hesin túrurin hevur verið sera gevandi fyri liðið, og hetta kann hjálpa føroyskum kvinnufótbólti á tann hátt, at genturnar hava okkurt at arbeiða fram ímóti, sigur Steintóra.

**Seks venjingar um vikuna**

Fyri Steintóru sjálva hevði tað stóran týdning at sleppa við til hesa kapping, hóast ávísir trupulleikar stungu seg upp undir fyrireikingunum.

- Eg havi spælt fótbólt í 10 ár nú. Byrjaði tá eg var 6 ára gomul, og líka síðan eg var 10 ára gomul, havi eg havt dreymin um at koma á U19-landsliðið - og sjálvandi A-landsliðið eisini. So tá eg hoyrdi at Føroyar fingu U17-landslið, gjørdist eg sum vera man sera spent. Vit hava fyrireikað okkum sum best upp til kappingina, við at hava vant ofta saman o.s.fr., men av tí at eg gangi á AaB-College í Danmark, havi eg ikki havt møguleika fyri at vant saman við teimum. Men her niðri venji eg upp til seks ferðir um vikuna, so tað var eingin trupulleiki, sigur Steintóra Jeonsen.



*Steintora Joensen úr Vági skeyt bæði málini, sum føroysku kvinnurnar fingu í Estlandi*

# Súkklu-FM um vikuskiftið



**Um vikuskiftið sleppa børn og vaksin at kappast um føroyska meistaraheitið í einkultstarti og fjallasúkkling**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Vegna heldur vánaligt veður síðsta vikuskifti bleiv kappingin um FM heiti í einkultstarti útsett til leygardagin komandi.

Leygardagin verður kappast í einkultstarti og sunnudagin í fjallasúkkling.

Leygardagin kl. 10.00 leggja tey vaksnu til brots. Tá verður kappast í 30 km einkultstarti. Koyrt verður á teininum millum Kaldbaksbotn og Kaldbaksbygd, og verður hesin teinur koyrdur fimm ferðir.

Kappingin hjá børnum byrjar kl. 12.00. Børnini koyra eisini á sama teini, men koyrt verður munandi styttri, ávikavist tveir, fýra og seks kilometrar.

Kappingin er fyri kvinnur og menn, gentir og dreingir.

**Fjallasúkkling**

Sunnudagin kl. 13.00 verður aftur lagt til brots, og tá stendur fjallasúkkling á skránni. Kappingin fer fram á økinum kring Plantusøluna í Hoyvík, og møtt verður undir hálvtakinum við Føroya Studentaskúla.

Tey vaksnu koyra í umleið ein tíma, og børnini um 20 minuttir. Kappingin hjá børnum byrjar kl. 14.00. Tilmelding er á staðnum.